


# FAKTA

## Per Ravn Omdal

**Per Ravn Omdal er føddur í Stavanger í 1947. Hann er fyrrverandi ítróttarleiðari og forseti í norska fótbóltssambandinum. Hóast hann ongantíð spældi fótbólt á hægsta stigi, gjørdist hann skjótt ein leiðari innan fótbóltin. Ikki minst er hann kendur fyri at hava røkt fleiri álitissessir í europeisku fótbóltssamgonguni, UEFA, og altjóða fótbóltssamgonguni, FIFA. Bæði í 1994 og 2003 var hann heiðraður við »Kniksens Hederspris«, og í ár var hann heiðraður við »Idrettsgallaens hederspris«.**

spældu vit altíð 11 ímóti 11, tí tey vaksnu vildu hava tað at vera soleiðis. Men tað var meiningsleyst, tí upp á tann máta vórðu so nógv sett uttanfyri, sum nú høvdu sloppið upp í part. Og í dag hava børnini dupult so stóra gleði av fótbóltinum, sum vit høvdu, sigur Per Ravn Omdal og nevnir eitt ítøkiligt dømi um, at smærri lið eru vegurin fram:

– Í amerikanskum gentufótbólti hava tey spælt tríggjar ímóti trimum í 20 ár. Í dag er USA á odda í heiminum, tá tað kemur til kvinnufótbólt, og har eru níggju milliónir spælarar. Í longdini gevur tað eisini betri fótbóltsspælarar, um tey byrja við smærri umstøðum upp á henda mátan.

### Mugu fáa øll við

Í Norra er henda skipanin við smærri liðum eisini nakað, ið verður brúkt hjá teimum vaksnu. Har spæla tey sjálvandi 11 ímóti 11, men so eru alternativar deildir, har vaksin spæla sjey ímóti sjey – serliga á smærru plássunum. Tað sama er hjá unglingunum, og allar royndir vísa, at slíkt spæl fostrar nógvar og góðar spælarar.

– Eg vil seta tað so avgerandi upp, at tekur tú hann ella hana á liðið, bara fyri at vinna dystirnar, heldur enn at lata øll sleppa at spæla, so ert tú á skeivari planet, tí tá gevst tann øgiliga skjótt, ið ikki verður tikin út. Tað, sum veruliga hevur nakað at siga, er tað langtrøkkandi perspektivið, at vit fáa børnini at spæla so leingi sum gjørligt, sigur Per Ravn Omdal.

– Vit uppliva hvørki vøkstur ella framgongd, fyrr enn vit hava sett okkum eitt hægri mál, enn at vit fyri alt í verðini skulu vinna ein dyst hjá teimum 11 ára gomlu. Tað snýr seg um at fáa øll við.

**Hilmar Jan Hansen**
**einslistir@kallnet.fo**

**– Tað, sum veruliga hevur nakað at siga, er tað langtrøkkandi perspektivið, at vit fáa børnini at spæla so leingi sum gjørligt, segði Per Ravn Omdal á fínum og hugvekjandi fyrilestri á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum**
**Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir**

